## Atli leysur av botninum

Atli Danielsen og FC Roskilde eru vælkoyrandi fyri tíðina. Seinnapartin í gjár vunnu teir 1-2 á botnliðnum Hvidovre og hava harvið flutt seg miðskeiðis upp í stigatalvuna. Hetta er fjórði dysturin á rað, at Atli Danielsen og liðfelagar hansara fara ósigraðir av vøllinum. Farna vikuskiftið spældu teir 3-3 móti Kolding, og teir báðar dystirnar fyri henda vunnu teir. Góða gongdin kemur væl við eftir heldur laka úrtøku fyrstu dystirnar hetta kappingarárið. Fimm dystir gingu áðrenn fyrsti sigurin kom til hølvdar, FC Roskilde tapti tríggjar teir fyrstu og spældu síðani tveir javnar, áðrenn teir komu á beint í 2-3 sigrinum á Fredericia. Atli Danielsen byrjaði sum vant dystin á sentrala miðvøllinum, men varð skiftur út 20 minuttir fyri tíð. Miðvallarleikarin úr Klaksvík tiltuskaði sær eitt gult kort í fyrra hálvleiki, og tískil tordi venjarin ikki at lata Atla Danielsen fullføra dystin,tí í tætta dystinum vóru sannlíkindini fyri einum næsta gula korti ikki lítil. FC Roskilde liggur nú nummar sjey í næstbestu donsku fótbóltsdeildini við 12 stigum. Sama stigatal hevur Skive, ið tó hevur eitt vet betri málúrtøku. Við sigrinum gjørdi FC Roskilde seg eisini leysan av botninum, og nú eru fimm stig niður til liðini niðanfyri markið.

*rolant@sosialurin.fo*



# KÍ er aftur í Vodafonedeildini!

**FÓTBÓLTUR** Klaksvík hevur umboð í bestu føroysku fótbóltsdeildini í 2011. Tað var greitt um vikuskiftið, tá KÍ vann sær pláss í Vodafonedeildini

Uni Holm Johannesen

Klaksvík er aftur til reiðar at bjóða teimum bestu av í fótbólti.

Tað er nú staðfest, at liðini, sum fluttu niður úr Vodafonedeildini í fjør, flyta upp aftur í bestu deildina. 07 Vestur og KÍ eru uppflytarar.

Kravið hjá KÍ undan vikuskiftinum var at fáa eitt stig í seinastu tveimum dystunum. Klaksvíkingar fingu trý í gjár. KÍ vann á útivølli móti næstbesta liðnum hjá NSÍ.

Úrslitið var 3-2.

### Ungt fólk

Fótbóltsliðið í Klaksvík var fyri nógvari frágongd í vetur. Todi Jónsson, Kristoffur Jakobsen, Hjallgrím Elttør, Jákup Mikkelsen, Símun Joensen og Atli Danielsen spældu á liðnum í fjør, men hildu ikki fram.

Manningin hjá KÍ hevur verið sera ung í hesum kappingarárinum. Sæð burtur frá Gunnari á Steig og Steffan Kalsø, so er talan um leikarar, sum eru lutfalsliga nýggir í fótbóltshøpi.

### 07 Vestur vann aftur

07 Vestur tryggjaði sær uppflyting í farnu viku. Liðið skal nú royna at halda fast um oddasessin í deildini, og ikki lata KÍ fara fram um á stigatalvuni.

Felagsliðið úr Vágum greiddi sína skyldu í gjár. Uppflytararnir vitjaðu hjá næstbesta liðnum hjá B68, og 07 Vestur vann 2-0.

### Hoyvíkingar komnir fyri

FC Hoyvík hevur róð tungan sjógv so at siga alt kappingarárið.

Liðið var í niðurflytingarvanda stóran part av árinum. Rúni Nolsøe, sum var venjari, takkaði fyri seg sum venjari miðskeiðis í kappingini. John Eystberg fekk ábyrgdina, og síðan hevur gingið støðugt framá.

Úrslitið var 3-3, tá TB vitjaði hjá FC Hoyvík í gjár.

*uni@sosialurin.fo*

**AB II – HB II** 0-2 (0-0)
Dómari: Birgir Sondum
0-1: Svenn Fuglø Jacobsen, 65.
0-2: Óli Arge, 79.

**NSÍ II – KÍ** 2-3 (1-1)
Dómari: Rói Jacobsen
0-1: Niels Pauli B. Danielsen, 6.
1-1: Andrias á Líknagøtu, 30.
1-2: Heri Klein Olsen, 67.
1-3: Niels Pauli B. Danielsen, 85.
2-3: Rógvi Højgaard, 90.

**VÍK II – EB/S II** 2-0 (1-0)
Dómari: Alex Troleis
1-0: Magnus G. Dalbø, 11.
2-0: Andras Mikkelsen, 54.

**FC Hoyvík – TB** 3-3 (1-1)
Dómari: Johan Petur Michelsen
1-0: John T. Poulsen, 3.
1-1: Petur Mortensen, 34.
1-2: Rógvi Joensen, 55.
2-2: John T. Poulsen, brts., 62.
2-3: Tórður Mortensen, 84.
3-3: Jan Mølvad Laursen, 86.

**B68 – 07V** 0-2 (0-1)
Dómari: Bent Tommy Linklett
0-1: Tór-Ingar Akselsen, 20.
0-2: Jens Erik Rasmussen, 54.